Týsdagin hin 11. august møtti Áhugabólkur Pensjónista í Trivnaðarnevndini at umrøða LM-002/2026 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Hækking av orkuískoyti, inntøkumørkum og ognarmørkum)

Áhugabólkur Pensjónista tekur undir við at tey, ið eru peningaliga verst fyri í samfelagnum, mugu fáa fíggjarligan styrk frá landinum. Tískil taka vit fult undir við hesum uppskoti, hóast tað einans skal galda til endan á 2026. Eisini gjørdu vit vart við, at vit halda, at ognarmørkini eru alt ov lág. Hetta bæði í mun til orkuískoyti og í mun til familjuískoyti.

Vit gjørdu vart við, at tað er alneyðugt at hækka pensjónirnar, sum seinnu árini eru vorðnar púra afturúrsigldar. Veitingarnar til pensjónistar eru seinnu árini lækkaðar í virði, hetta bæði sæð í mun til prísstøðið og lønarlagið annars. Bæði fólkapensjónin til støk og miðal- og lægsta fyritíðarpensjón til støk liggja langt undir fátækraváðamarkinum. (Fólkapensjónin er gott 8.000 kr., miðal fyritíðarpensjónin uml. 18.000 kr. og lægsta fyritíðarpensjón uml. 19.000 kr. undir fátækraváða-markinum).

Formaðurin í Trivnaðarnevndini, Grímur Sundstein, spurdi, um onnur átøk kundi verið gjørd enn fyriliggjandi uppskot um at veita lágløntum orkuískoyti.

Áhugabólkur Pensjónista vísti á, at løgtingið t.d. kann samtykkja at geva lágløntum pensjónistum, tað veri seg fólkapensjónistum og fyritíðarpensjónistum, ein eldrakekk/pensjónskekk eftir danskari fyrimynd, har lágløntir fólkapensjónistar fáa eldrakekk á 26.000 kr. árliga, um tey eiga ogn, ið lægri enn 108.000 kr.

Eisini varð víst á, at tað hevði gjørt stóran mun hjá fyritíðarpensjónistum, um teir kundu fingið útgoldið óbrúktan fyritíðarpensjónsfrádrátt (fyri gift 10.500 kr. árliga og fyri støk er 16.200 kr. árliga), eins og t.d. barnafrádrátturin í dag verður útgoldin, um ongin skattur er at draga frá í.

Áhugabólkur Pensjónista vísti á, at neyðugt er beinanvegin at seta átøk í verk fyri tey, ið verst eru fyri fíggjarliga, og somuleiðis beinanvegin at arbeiða við átøkum at koma í gildi fyri 2027.

Við heilsan

Áhugabólkur Pensjónista